


***Nr. 25*** ***5. desember 2021*** ***81. árg.***

# Ein jólauppliving á jútsku heiðini

Eg var borin í heim í 1896 í Sdr. Omme sókn, har pápi var traðarmaður, og eg havi nógv góð minni frá barnaárum mínum. Bæði foreldur míni vóru trúgvandi og høvdu góða songrødd, so tað vóru mest andaligir sangir, sum ljóðaðu í heiminum, og vit børn sungu við. Minnist meg rætt, var yndissangur teirra: „Hidindtil Herren har hjulpet så vel“. Álitið og trúgvin hjá foreldrum mínum á Guds náðigu forsjón hjálpti teimum gjøgnum ringar tíðir við fátækdómi og sjúku.

Av tí at vit vóru átta systkin, máttu vit tíðliga út at tæna, og tá ið eg var níggju ár, fekk eg starv sum røktingardrongur. Ofta var tað strevið, og tíðum mátti eg arbeiða sum ein vaksin maður; men heima hevði mamma lært meg at biðja til Gud, tá ið eg kom í neyð, so tað gjørdi eg, og eg fekk nógv bønarsvar longu sum smádrongur.

Tá ið eg var 16 ár, fekk eg arbeiði á einum bóndagarði, har maðurin æt Jósef og kona hansara Maria. Jósef las ein kapittul úr Bíbliuni hvønn morgun og ein hvørt kvøld. Vit sungu eisini ein sálm um morgunin. Harafturat las hann á middegi eitt stykki úr andaktsbókini hjá Roseniusi. Har á garðinum búðu ofta talarar, sum hildu møti í missónshúsinum í sóknini. Jósef hevði bygt missiónshúsið saman við øðrum trúgvandi.

Beint fyri jól skuldi ein trúboðari, sum kallaðist J. Santon, koma at gista á garðinum og halda møti eina heila viku í missiónshúsinum. Um hesa tíðina kom andalig veking í bygdarlagið. Vit á garðinum skiftust um at fara á møti, og eitt kvøldið fekk eg eisini frí, so eg kundi fara. Møtið byrjaði við,

at Santon sang og spældi á sín lutt ein sang, hann sjálvur hevði skrivað:

Du hørte kun rygtet, som fløj dig forbi,
du kender kun Herren af navn,
af stingende torne er opfyldt din sti
og din sjæl af et knugende savn.
Du må se! Du må se!
Ej blot høre rygter,
nej, selv må du se!
Guds Lam må du se!
Du hørte kun rygtet, men liv fik du ej;
du drak ej af livskildens brønd.
Nu Ånden dig kalder fra vildsomme vej:
„Kom i dag og få liv i Guds søn."

Hin fyrsti jólakavin var komin, meðan vit vóru inni á møtinum, og lá nú sum eitt teppi yvir landslagið. Vit høvdu langan veg heim yvir lyngheiðina, har tað bert var einum hjólspori, vit skuldu fylgja. Jósef gekk fremstur. Santon og eg gingu í hansara fótasporum. Aftastur kom gamli faðir Jósefs, sum rópti: „Jósef, finnur tú ikki vegin?"

Men Jósef svaraði: „Nei, eg finni ongan veg. Vit eru vilstir á heiðini, og tungt er at ganga í djúpum kava." Santon gekk og bað: „Jesus, hjálp okkum at finna leiðina heim." Men brádliga sá Jósef eitt lítið ljós einastaðni har frammi.

Vit gingu eftir tí, og tað leiddi okkum heim, tí tað var Maria har heima, sum hevði sett ljós í vindeygað at leiða okkum rætt. Eg fór beinanvegin inn í húskallakamarið, sum lá við síðuna av stallinum, blaðaði upp í Bíbliu míni og fór at lesa í Rómverjabrævinum 8. kap. 1. vers: „So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi."

So fór eg at takka Jesusi fyri, at eg ikki var undir fordøming, av tí at eg vildi tilhoyra Harranum. Eg las víðari í Rómverjabrævinum og kom til 10. kap., og í versi 13 las eg: „Tí at hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur." Hitt stóra undurið hendi - Jesus, mín Frelsari, boygdi seg niður og frelsti meg. Eg tordi barnsligt og einfalt at trúgva, at syndir mínar vóru fyrigivnar av náði við trúgv á tað fullgjørda verkið á Golgata.

Eftir at eg var komin til trúgv á Jesus, var hægsta ynski mítt at vera saman við Guds fólki. Eg varð tá boðin at vera við á einum møti um jólini, har tey ungu, sum vóru blivin frelst, fóru at vitna. Vit vóru fýra ung, sum fylgdust og gingu 30 km fyri at vera við á møtinum. Dagin eftir gingu vit teir 30 km heimaftur. Hetta gjørdust eini undurfull jól, sum eg ongantíð gloymi. Tey ungu, sum høvdu upplivað frelsuna, sungu og vitnaðu.

Hjá Jes. 9. kap. v. 6 lesa vit: „Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla ... veldigur Gud, ævinnar faðir, friðarhøvdingi.“ Jesus var undurfullur í sínum jarðarlívi. Hann livdi millum syndarar; men hann var syndafríur. Hann kom saman við teimum ríku; men hann varð verandi óspiltur av teirra gulli. Hann segði um seg sjálvan einaferðina: „Revar eiga holur, og reiður eiga himmalsins fuglar; men menniskjusonurin eigur ikki tað, sum hann kann halla høvur sítt at.“ Jesus Kristus bjóðar sína frelsu, gleði og frið til øll, sum vilja seta sítt álit á hann.

*Effie Campbell* umsetti.

# Klettur, klovin fyri mær!

Eg vil siga takk fyri páskanna boðskap við einum gomlum sálmi, hvørs boðskapur hevur størri týdning enn sangir í túsunda tali við tómum tekstum, sum fylla loftmiðlarnar døgnið á tamb.

Sálmurin eitur „Klettur, klovin fyri mær, lat meg fáa lívd hjá tær!“

Tann **Kletturin** gav sína guddómsmakt frá sær. Hann setti seg sjálvan lágt og tók á seg tænaramynd og gjørdist menniskja. Sum menniskja eyðmýkti Hann seg – og gav seg undir deyðan á einum krossi. Tí hevur Gud eisini hátt upphevjað Hann og givið Honum navnið, sum er yvir hvørjum einum navni. Øll skulu boyggja knæ fyri Honum – á himli og á jørð og undir jørðini. Øll skulu játta til Guds faðirs æru: JESUS KRISTUS ER HARRI! (Fil. kap. 2) Tað geri eg nú við gleði og tøkk.

Sálmur 62,2–3: „Bíða í kvirru, sál mín, Gudi, frelsa mín kemur frá honum! Eina Hann er mín Klettur, mín Frelsa, mín Borg, eg skal ikki vikast.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Hví kom hann?

*Í fylling tíðarinnar sendi Gud son sín til okkara jørð. (Gal. 4,4).*

**Hví kom Hann?** Tær heilagu Skriftirnar boðaðu nágreiniliga frá komu hansara, og tær somu Skriftirnar siga okkum ORSØKINA til komu hansara.

Fyri tað fyrsta kom hann, so at vit ikki skuldu glatast, men fáa ævigt lív! (Jóh. 3,16) Men tað tykist, at fólk flest ikki brýggja seg um nakað annað lív enn hetta stutta og forgeingiliga jarðarlívið! Ófatiligt. Men fyri teg – tú, sum skríggjar í hjarta tínum eftir onkrum meir: Tað var fyri TEG, hann kom!

Fyri tað næsta: Hann kom fyri at fría út øll tey, sum trælaðu undir deyðaræðslu og ótta. (Hebr. 2,15). Nú eru tað vissuliga fólk, sum tvíhalda um, at tey óttast einki sum helst! Og tað kann tykjast, sum eru hesi sannar hetjur. Men tað hjálpir teimum einki. Heldur tvørturímóti! Men til teirra, sum kenna óttans pínu í sál síni: **Tað var fyri TEG, hann kom!**

Fyri tað triðja og síðsta: Hann kom at gera tað, sum vit sjálv ikki megnaðu! (Róm. 8,3). „Á, eg klári meg stak væl!" tvíhalda summi so sjálvvís. Men arma sál – hvussu leingi? Tú, sum annars hevur sæð tað – og veruliga plágast av ikki at røkka til: **Hann kom fyri TEG!** Og minst nú til: Jesus ger enn í dag tað, sum hann kom til – sambært sítt æviga Orð!

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit kristnu eru ov ófør at minnast, hvat ið Gud gjørdi einaferð. Á jólum minnast vit Jesus sum pinkubarn, og tað var hann eisini. Men mong eru ikki komin víðari enn til pinkubarnið Jesus. Í dag eiga vit at kenna hann sum Kongur konga og Harri harra.

*e. c.* ums.

---

Satan arbeiðir uppá at draga Kristus út úr jólunum, bønirnar út úr skúlunum og Gud út úr landstýrinum. Men hann fer ikki at vinna, og tað veit hann væl. (Sí Opb. 12,12). *e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 5. des. | Tekstur: Jes. 7,14 + 9,6 | bíbliuorð: Jes. 9,6a |
| 12. des. | Tekstur: Luk. 1,26-38 | bíbliuorð: Luk. 1,28 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 26* *19. desember 2021* *81. árg.*

# Stjørnan, sum leiðir

*„Stjørnan leiddi vísmenn fyrst,so teir funnu Jesus Krist; –*

Tá ið Gud gav fyrstu jólagávu sína, einkarson sín, til eina falna mannaætt, síggja vit, at hann eisini gjørdi alt, at henda ætt skuldi finna hann og taka ímóti honum.

Gud sendi einglar til hirðarnar, teir fóru, og teir funnu, og teir upplivdu jólagleðina.

Gud setti eina stjørnu upp á himmalin, so teir vísu menninir eisini kundu finna Jesus. Longu her síggja vit kanska, at tað er torførari hjá hesum heimsins vísu. Tá ið teir komu til „landið“, fylgdu teir ikki stjørnuni, tí tað gekk ímóti teirra „vísdómi“, sum segði, at ein kongur sjálvandi mátti verða føddur uppi á kongsborgini. Vit vita, at hesin „vísdómur“ skapti sorg og ræðslu seinni. Tá ið teir komu á rættan veg, sóu teir stjørnuna aftur, hon leiddi teir til kong konga, og teir upplivdu jólagleðina.

Gud hevur givið okkum orð sítt, Bíbliuna, at leiða okkum til Jesus og alt tað, hann hevur til okkara. Sum vísmenninir hildu, at stjørnan leiddi móti øllum sunnum skili, soleiðis halda vit, at Guds orð ofta gongur móti okkara „sunna skili“, vit skilja hetta ikki. Latið okkum ikki missa nakað av øllum tí, Gud so dýrt hevur keypt okkum, av tí at vit vilja skilja orð hansara staðin fyri bert at trúgva teimum.

– okkum við ein stjørna leiðir,
okkum lívsins gøtu greiðir,
so vit finna Jesus Krist.“

*Effie Campbell* umsetti.



# Hvat merkja jólini?

Fyri Gud merktu jólini offur og sakn. „Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll.“ Róm. 8,32. Hann elskaði okkum so høgt, at „hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.“ Jóh. 3,16.

Fyri Jesus merktu tey offur og sakn. „Tá ið hann var í Guds mynd, ikki helt tað fyri rán at vera Gudi líkur, men avklæddi seg hana, í tí at hann tók á seg tænara mynd og gjørdist monnum líkur; og tá ið hann í framkomu var sum maður, setti hann seg sjálvan lágt, og varð lýðin til deyða, ja, til deyða á krossi.“ Fil. 2,6–8.

Fyri teg og meg merkja jólini, at av tí at Jesus gekk allan vegin niðan higar at møta okkum á Golgata, sleppa vit at fylgjast við honum allan vegin fyri at møta tí æviga Gudi. Tí „hann er vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við honum.“ Jóh. 14,6.

Fyri hirðarnar merktu tey fyrstu jólini jólaskundur - við at finna Jesus. Teir fóru í skundi hagar. Luk. 2,16. Teir upplivdu jólagleðina. Luk. 2,20.

Fyri vísmenninar merktu tey jólaferð; men henda ferðin var fyri at finna Jesus. Teir upplivdu jólagleðina. Matt. 2,10.

Mátti Jesus eisini fyri teg og meg merkt hina sonnu jólagleðina, av tí at Jesus er miðdepilin, og av tí at vit fáa loyvi at bera boðskapin um hann víðari, bæði til stór og smá.

„Hann kom til sítt egna, og hansara egnu tóku ikki ímóti honum. Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóh. 1,11–12.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus einsamallur, bara Jesus

Tríggjar dagar fyri deyða sín varð hin viðgitni listamálarin Gustave Doré (1833–1883) liðugur við stóru mynd sína: Táradalurin.

Á hesa mynd hevði hann málað heimsins líðingar, sorgir, trongdir og pínur. Hann málaði en kong, sum suffaði undir tyngdini av krúnuni, eina mammu við doyggjandi barni sínum

á fanginum, sjúk við sínum ósigandi pínum og verkum, ein spitalskan við sínum upptærdu limum, brotsmenn, píndar av samvitsku síni. Men øll andlit vóru vend móti tí hjástadda Jesusi, hendurnar á øllum vóru rættar út móti honum, sum peikaði uppeftir móti Guds staði, har eingi tár, ongar líðingar og eingin pína er til.

Við mynd síni vildi Doré peika á Jesus - Jesus einsamallan, bara Jesus – sum Frelsara heimsins.

\- - -

Gud er hin einasti, vit kunnu líta okkum upp í hendurnar á uttan at óttast fyri at verða lumpað, svikin ella misbrúkt á nakran hátt.

Um vit gera eina vanliga menniskju til okkara lívs alt og eitt, tá fara vit at verða vónsvikin.

*„Et Ord med på Vejen“* - *Effie Campbell* umsetti.





# Tá ið presturin Frithiof Bjørk fekk einglavitjan

Forlagið Lohse gav í 1967 út eina bók hjá P. H. Lauritzen. Bókin kallast „Engle - mystik og virkelighed.“ Frithiof Bjørk (helst úr Svøríki) skrivaði um tað, sum hann hevði upplivað, soleiðis:

„Eg hevði sagt prestastarvið frá mær sum mótmæli móti tí liberalu teologiini og fór úr starvinum í Blasieholmkirkjuni.

Eg livdi og virkaði sum fríur prædikumaður. Góð fólk uppihildu mær. Summarið 1919 stóð hin lítla kirkjan liðug. Tey høvdu givið mær grundstykki og tilfar.

Eg skrivaði síðani til bispin og bað hann koma at víga kirkjuna. Sum svar fekk eg eitt bróðurligt bræv, har hann ynskti mær Guds signing, men greiddi frá, at hann hevði ongan myndugleika at víga kirkjur uttan fyri statskirkjuna.

Eg gjørdist vónbrotin og skilti, at eg varð noyddur at víga kirkjuna sjálvur. Vígslan fór fram sum ein stór høgtíð. Kjokkfult av fólki var komið til bygdar.

Um kvøldið, tá ið alt var liðugt, og eg hevði fylgt nøkrum vinum til tokið, gekk eg einsamallur heim gjøgnum skógin. Hjartað var fult av takk og lov fyri henda ógloymandi dagin. Lítið visti eg, hvussu ógloymandi hesin dagur av sonnum skuldi gerast mær.

Klokkan var 9 á kvøldi. Eg ætlaði mær at fara einsamallur inn í kirkjuna at takka Gudi, at eg hevði fingið eina kirkju at prædika í.



Eg læt kirkjudyrnar upp og varð standandi við hondini á handtakinum uttan at flyta meg. Har frammi við altarið stóð ein eingil við bakinum ímóti mær. Av kropsburðinum skilti eg, at eingilin hevði lagt armarnar á kross tvørtur um bringuna. Høvdið vendi eitt sindur uppeftir í tilbiðjan. Eg sá skilliga hvørja legd í hvíta klædnaplaggi hansara. Klæðið var vovið saman av livandi, glitrandi ljósi, sum sól á nýlagstum kava. Ljósglæman stóð sum ein heilt hvítur ælabogi ella gloria út frá øllum likami hansara, ikki bara út frá høvdinum, sum vit so ofta síggja á einglamyndum. Veingir sá eg ongar.

Tað løgnasta var dámurin inni í kirkjuni. Tú veitst, hvussu tað kennist, tá ið tú ein kaldan vetrardag kemur inn í eitt heitt rúm. Hitin slær ímóti andliti tínum. Á sama hátt kendi eg nú eina fysiska aldu av himmalskari eydnu og friði.

Samstundis gjørdist eg bangin. Eg kom at hugsa um orðini hjá Pæturi: „Far burtur frá mær, Harri, eg eri ein syndigur maður."

Eg kendi meg deyðabangnan fyri tí yvirnatúrliga og hevði syndarans ótta fyri tí treytaleysa Heilaga.

Minst 10 minuttir munnu vera farnir, tá ið tann himmalski gesturin brádliga vendi sær á, so eg sá hann frá liðini. Hann hevði menniskjaskap, men var hvørki maður ella kona. Gjøgnum tað sterka, skínandi ljósið hómaði eg tað reina álvarsemið í andlitsbragdinum. Uttan at geva ljóð frá sær gleið eingilin burtur og bleiv burturi. Í somu løtu kendist tað, sum tá ið tú sløkkir ljósið, og alt verður myrkt. Dámurin - atmosferan - inni í kirkjuni var aftur jarðiskur. Luftin fekk tey vanligu hitastigini aftur.

Tá ið ein góð løta var farin, vágaði eg mær fram til altarið. Eg kendi, at tað mól fyri mær, og at enda sá eg, at eg lá á knæ har inni.

„*Kirkeklokken*". - *Effie Campbell* umsetti.



**Sunnudagsblaðið**

**ynskir øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári**



## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 19. des. | Tekstur: Luk. 2,1-20 | bíbliuorð: Luk. 2,10-11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74